# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum tann 25. sept. 2004.*

**Sóllind og Áki**



*Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt gleddu okkum og vóru við til at gera brúdleypsdag okkara, 01. januar 2005, so minnisríkan.*

**Súsanna og Jónleif Lydersen**

*Hjartaliga takka vit øllum sum á ymsan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara 8. jan. 2005 so minnisríkan. Takk fyri gávur, fjarrit, blómur og alla ta hjálp, ið vit fingu.*

**Ynskja Sóley, Jóhan og Poul Sundskarð**





*Av hjarta takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera silvurbrúðleypsdag okkara, ið varð hildin 19. juni 2005 so hugnaligan og minnisríkan. Takk fyri blómur, gávur, fjarrit og fyri alla hjálpina. Uttan tykkum lat tað seg ikki gera. Enn einaferð stóra tøkk.*

**Kærar heilsanir**
**Anna Petra og Karlon Winther**




Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Vit søkja eftir KT-leiðara til nýstovnaðu Vitanardeildina á Almannastovni til setan skjótast gjørligt. Á deildini koma at starvast trý fólk og leiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran. Starvsøkið hjá Vit- anardeildini er at menna grundarlag fyri skipaðari vitanardeiling, at menna prosessir innan KT, integratión av KT og virkisgongdum, at umsita og menna KT-økið og at effektivisera mannagongdir í tøttum samstarvi við stáps- og rakstrardeildirnar á Almannastovuni.

## Almannastovan søkir KT-leiðara til Vitanardeildina.

KT-leiðarin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingunum í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er at KT-leiðarin er virkisfúsur og eltir uppgávurnar frá byrjan til enda, hevur góð samstarvsevni og er sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Vit sóknast eftir einum fólki, sum hevur viðkomandi prógv frá hægri lærustovni, so sum polit, oecon, cand. merc. ella aðra hóskandi útbúgving. Einum fólki, sum hevur leiðsluroyndir og royndir innan økið, hevur góðan førleika innan KT og hevur evni til at raðfesta og tilrættisleggja arbeiðið.

**Starvið umfatar í høvuðsheitum**

- at ráðgeva og vegleiða leiðsluni í KT-viðurskiftum
- at KT verður gagnnýtt við atliti til m.a. at effektivisera mannagongdir á stovninum
- ábyrgdina av at skipa leiðsluhagtøl og almenn hagtøl, umframt greinignarverkætlanir
- ábyrgdina av KT-trygdini á Almannastovuni
- ábyrgdina av og víðari menning av kjarnuskipanini á stovninum
- at leiða verkætlanir, eisini tvørfakligar
- at skipa mannagongdir á KT-økinum og
- aðrar ad hoc uppgávur

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 12. juli 2005 kl. 12.

Send umsóknina til:
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

KREA.FO · TEL 44 93 39

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo